

## Leskiligir føroyskir fiskarættir, uttan lønsemi

At tað er trupult at fáast við fiskaframleiðslu á landi er Norðfra í Norðdepli gott dømi um. Í 2007 hevði felagið eitt hall uppá 1.067 milliónir krónur. Seinastu 5 árini hevur samlaða hallið hjá fyritøkuni verið góðar 4 milliónir krónur. Hóast stór hall í fleiri ár rað hevur tað eydnast Norðfra at halda fram við virkseminum. Í 2005 fekk felagið eina hjálpandi hond frá sínum fíggingarstovni, og seinni eru nýggir íleggjarar komnir inn í myndina. Felagið fekk herfyri avtalu í lag við stóra danska handilsketu, um eina minni, men tó fasta leveransu, av sínum dygdargóðu fiskaúrdráttum. Kelda: bl.fo

# Sveimandi Fípa Fagra



*Standmyndin Fípan Fagra hevur skap av einum portri, ið borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, lýsti sum byrjanina til eina spennandi tíð fyri býin*

**Fípan Fagra er navnið á sveimandi kvinnuni á standmyndini hjá Hans Paula Olsen, ið borgarstjórin í Klaksvík lýsti sum ímyndin av eini nýggjari byrjan**

LIST

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ein sveimandi kvinnukroppur millum tveir skulpturellar steinar kom til sjóndar, tá nýggja standmyndin hjá Hans Paula Olsen varð avdúkað leygarmorgunin í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar Kommunu.

### Frælsi, yndi og dirvi

Standmyndin hevur fingið navnið Fípan Fagra, og eins og báturin, vit kenna úr kvæðunum, ímyndar hon frælsi, yndi og og dirvi.

Sambært myndahøggaranum Hans Pauli Olsen ætlaði hann av fyrstan tíð at hava Kunoyarnes sum bakgrund, men hann fekk tað ikki reiðiliga at rigga.

- Við standmyndum, sum hesum, ræður tað um at finna eina samanrenning millum listarliga hugskotið og tað, sum praktiskt letur seg gera. Á hendan hátt er Kunoyarnes onkursvegna kortini við, tí vit hava lyndi at venda okkum tann vegin, ið kvinnan hyggur, sigur Hans Pauli Olsen.



*Myndahøggarin, Hans Pauli Olsen, bíðar spentur eftir at hansara higartil størsta standmynd verður avdúkað*

Steinsúlurnar, sum kroppurin er eins og spentur út ímillum, ímynda nakrar av Norðoyggjunum í baksýni, meðan sveimandi kvinnan skoðar út yvir Klaksvíkina og út móti Kunoyarnesi.

Á hendan hátt hevur sjálv standmyndin skap av einum portri, ið borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, lýsti sum byrjanin til eina nýggja tíð við nýggjum møguleikum og avbjóðingum.

### Á hægri støði

Eisini vísti borgarstjórin á, at plássið, standmyndin hevur fingið, ikki er valt av tilvild. Tað var nevniliga her í Vágstúni, at várting vórðu hildin, og tað er ikki tal á teimum fólkafundum og øðrum fundum, sum hava verið hildnir har á staðnum.

Hiðani er eisini tað so eyðkenda útsýnið móti Kunoyarnesi, sum man vera tað mest eyðkenda fyri Klaksvík, og sum eisini sæst aftur í búmerkinum hjá kommununi.

Í røðuni segði Steinbjørn O. Jacobsen millum annað, at býráðið seinnu árini hevur lagt sera nógva orku í at fríðka um býin – eitt arbeiði, ið nú veruliga gevur úrslit.

- List er eisini partur av hesi somu menningini, sum er við til at lyfta Klaksvík upp á eitt hægri støði, bæði umhvørvisliga við vakurleika og mentanarliga við súmbolikki, sum fær hugin at reika – uttan mun til, hvussu tann einstaki velur at fata og tulka hendan súmbolikkin, segði borgarstjórin.

# Sjómannadagurin - ein dagur fyri seg

**John William Joensen, kunningarleiðari í sambandi við Føroya Sjómannadag, sigur, at dagurin í ár eydnaðist serstakliga væl, men hann heldur, at dagurin frameftir kortini skal haldast fyri seg – og ikki saman við øðrum tiltøkum í kommununi**

SJÓMANNADAGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit eru serstakliga væl nøgd við Føroya Sjómannadag, sum vit halda eydnaðist avbera væl. Vit hava júst havt summarfestival her norðuri, og nú varð skráin fyri sjómannadagin partvís samantvinnað við 100-ára hátíðarhaldið hjá Klaksvíkar kommunu. Tað eru í fleiri førum tey somu fólkini, sum eru virkin til hesi tiltøk, og tí merkir tað eisini, at nógvar kreftir eru brúktar, og fólk hava í longri tíð verið upptikin av hesum tiltøkum.

John William Joensen heldur, at hóast stóra tiltakið í Klaksvík í síðstu viku, sum endaði við hæddarpunktinum, ið var sjómannadagurin leygardagin, eydnaðist serstakliga væl, so heldur hann, at dagarnir kortini hava lært fyrireikararnar av sjómannadegnum, at hesin dagurin frameftir skal haldast fyri seg – og ikki saman við øðrum tiltøkum.

### Hópur av fólki

John William sigur, at fleiri fólk enn áður vóru á sjómannadegnum leygardagin – í fyrsta lagi hópur av norðoyingum, fólki aðrastaðni úr landinum, og eisini vóru nógv útlendsk ferðafólk at síggja.

- Vit hava seinastu árini umsett skránna fyri sjómannadagin til norðurlendskt og enskt, og longu nú er ætlanin at gera uppaftur meira burtur úr hesi kunning.

Hann sigur, at fyrireikararnir av tiltakinum í góðari tíð ætla sær at gera skránna klára til komandi ár og fáa hana umsetta, so kunningarstovur og ferðaskrivstovur í størri mun enn áður kunnu senda hana út til síni viðskiftafólk.

- Tað vísir seg nevniliga, at útlendsk ferðafólk eru vorðin ein fittur partur av teimum, sum vitja í Klaksvík á hesum degi, sigur hann.

### Veðrið helt sær

Eitt, sum spælir nógv inn ein slíkan familjudag, sum Føroya Sjómannadagur er, er veðrið, og tíbetur fyri fyrireikararnar helt veðrið sær leygardagin væl.

- Tað gjørdist eitt sindur gráligt, sum leygarmorgunin leið, og um middagsleitið fór at regna eina løtu. Men skjótt sleit í aftur, og veðrið gjørdist bara betri og betri, sum seinnaparturin leið.

John William sigur, at fyrireikararnir høvdu fingið sær eitt stórt tjald, har fólk kundu vera inni, um líkindini ikki háttaðu sær, soleiðis sum ynskiligt var.

Hann sigur, at tá ið felagsmøti varð hildið í tjaldinum seinnapartin sunnudagin, sum partur av skránni, var fitt av vindi, men hóast hetta gekk alt væl, og nógv fólk vóru á møtinum.

Sunnudagin var eisini sjómansgudstænasta í Christianskirkjuni, har Hanus Simonsen, prestur, prædikaði.

### Gleða seg

- Jú, vit eru serstakliga væl nøgd, og vit gleða okkum longu til Føroya Sjómannadag komandi ár, sigur John William Joensen, kunningarleiðari.

Sosialurin fer at venda aftur til ymisku úrslitini í kappingunum á sjómannadegnum í komandi bløðum.